# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**Hósdagin 19. juni**
***Eldrasambýlið Gøtubrá í Norðragøtu:*** kl. 16, Lisbeth Solmunde Michelsen

**Fríggjadagin 20. juni**
***Eldrasambýlið Vesturskyn á Toftum:*** kl. 16, Lisbeth Solmunde Michelsen

**5. sunnudagur e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Ann D. Hansen
***Nólsoyar kirkja:*** kl. 12 Sonja Klein
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Lestur
***Vesturkirkjan*** kl. 11 Hanus Simonsen altarg. ***Talvan gongur fyri Hina Føroysku sjómansmissiónina***
***Argir:*** kl. 11 Lestur. ***Talvan gongur fyri Hina Føroysku sjómansmissiónina***
***Sørvágur:*** kl. 11, Inga Poulsen Dam
***Eiði:*** kl. 11 messa (morgunmatur í Karmel kl. 9.30) Emil Olsen.
***Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri hina Føroysku Sjómansmissiónina***
***Gøtu kirkja:*** kl. 11 Lisbeth Solmunde Michelsen
***Æðuvík:*** kl. 18 Lisbeth Solmunde Michelsen
***Elduvík:*** kl. 12, alt. Uni Næs
***Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Sjómansmissiónina***
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Theodor E. D. Olsen. ***Sunnudagin 22. juni gongur talvan í Norðstreymoyar prestagjaldi fyri Føroysku sjómansmissiónina.***
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11 guðstænasta v/ Henning Bøgesvang
***Mikladalur:*** kl. 12, Niels Pauli Danielsen
***Árnafjørður:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Lestur
***Sunnudagin 22. juni gongur talvan í Norðoya eystara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómansmissiónina.***
***Vágur:*** kl. 11 Jónsvein Bech
***Hvalba:*** kl. 12.30 Símun Jacobsen altarg. ***Talvan gongur fyri Hina Føroysku sjómansmissiónina***
***Sandvík:*** kl. 18, Símun Jacobsen altarg. ***Talvan gongur fyri Hina Føroysku sjómansmissiónina***

***Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Føroysku Sjómansmissiónina***

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið møti kl. 20.
Sunnukvøldið møti kl. 18.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 16.30 bøn fyri Ísrael og býnum v.m.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Familjumøti.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 bønarmøti, kl. 19 streingjakórið venur.
Sunnudagin kl. 11 møti, farvæl fyri Eyðfinn og Siv Joensen. Njál Djurhuus talar.
kl. 18 møti, Njál Djurhuus talar. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mikudagur 18. juni kl. 20: Bíbliutími og bønarløta. Evni: Nehemias 2.
Sunnudagur 22. juni kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli
Kl. 12.15: Møti. Virgar Hvidbro talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræti**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Hendrik T.Olsen Evni: »Tað, sum hendi á apostlanna døgum! Kann tað eisini henda á okkara døgum?«. Kl. 12 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Seinasta After 8 áðrenn summarfrítíðina var fríggjakvøldið 13. juni. Boðað verður frá, tá byrjað verður aftur.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur kl. 20 Bíbliutími.
Fríggjadagur kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagur kl. 11 Sunnudagsskúli.
Sunnudagur kl. 19 Møti við Jon Eli Johannesen.

**Ebenezer**
Týsdag kl. 19 Fundur fyri øll, ið hava áhuga í sunnudagsskúlaarbeiði.
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti – Talari: Osmund Justinussen.
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti – Seinasta fyri summarferiuna.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
– Talari: Jógvan Zachariasen – Evni: Hjúnabandið.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Fra Meinigheitshúsinum í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími Heb. 5 Gunnar Reynslág
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/Tom og Meinhard tosa um DTS.
Sunnudag kl. 18 Møti v/ Petur O.K. Olufsson. Sangur Jóan Magnus Olsen úr Salt.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívdin á Brekku 3**
Týskvøldið kl. 20 verður samkomufundur.
Tosa verður um nýggja bygningin.
Annars verður víst til heimasíðuna.
www.livdin.fo

**KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing-kórið venur.
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: KFUK fundur fyri limir.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta.**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
http://www.gospel.fo

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti. Onki morgunmøti í summar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kedron í Sørvági**
Mikudagin 18. juni kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 11.30 Sunnudagsskúli, einki kvøldmøti.

**Saron, Vestmanna**
Týsdagin 17/06 Bønarmøti í Saron klokkan 20.
Sunnudagin 22/06 - Evangeliskt møti klokkan 18.
Náttúrði aftaná møti.
Sí: www.saron.fo
Verið vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin 18. juni kl. 6 Bøn, kl. 20 Bíbiltími - Trúarlæra, Bíbliunnar íblástur v/Jonhard Olsen. Øll eru hjartaliga væl komin.
Hósdagur kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti. Glyvrapraise
Sunnudagur 22. juni kl. 17 Sunnudagsskúli og møti
Tala: Olaf Magnussen, Toftir
Aftaná møti verður frágreiðing frá málbólkunum frá møtinum 1. juni 2008 .
Mikudagur 25. juni kl. 6 Bøn. Kl. 20 Bíbiltími - Áps. 5,33-42. Røða Gamalies/ Ápostlarnir sleppa leysir v/Bjartur F. Johannesen.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19 Bønarmøti.
Mikukvøldi kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið, Søldarfjørður**
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 talar Margar Toftegaard.
Sangkreftir luttaka.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Sonna Djurhuus.
Sunnudagin kl 11, Morgunmøti við Paula Høj. Sangur við Bent Leo Jarnskor.
Barnamøti kl. 11.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Rituvík**
Mikudagin 18. juni kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 19 Juniorringur.
Leygardagin kl. 20 Blákross kaffé v.m. (Tofta blákrossfelag hevur Tilatk í samband við at Felagið er 100 ár)
Sunnudagin kl. 18 Blákrossmøti.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Tim Sharp greiðir frá trúboðaraarbeiði á Filipsoyggjum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria Klaksvík**
Mikudagin kl. 20 hugnaløta fyri ung.
Hósdagin kl. 19 ungdómsmøti - tað seinasta fyri summarsteðgin.
Sunnudagin kl. 18 møti við Paula Høj.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**KFUM & K Klaksvík**
Mikudagin 18. juni kl. 20 Bíbliutími við Øssur Kjølbro Nehemia Kap. 10-11.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Mikukvøldið kl. 20 er bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti v/ Getza-Girls
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn v/ morgunmati.
Sunnudagin kl. 11 er møti v/ Andreas Nýggjagarð.
Barnamøti er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 19. kap.
Sunnudagin Kl. 18 møti v/Sylverius Jacobsen, Skála. Innsavnan til húsið.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.

**Betania, Skopun**
Týsdagin Ungdómurin kemur saman kl. 19.
Mikudagin Bønarmøti kl. 20.

**Vágur/ Bethel**
Mikukvøldið 18. juni - á møtinum kl. 20 tala Osvald Kjærbo og Svein Petersen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lopra/ Bygdahúsið**
Hóskvøldið 19. juni - møti verður kl. 20.
Osvald Kjærbo talar
Terji Nilssen, Kaj Meyer, Svein Petersen syngja.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11.00 og kl. 18.00.
Bønarmøti mánakvøld kl. 20.00.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491 Fax 316481*
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur:tilhald@ torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur***
10.00 – 10.30 Fimleikur - Grete Ellingsgaard
10.00 – 12.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
14.00 – 16.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
14.00 - 17.00 Kortspæl o.o. spøl
***Túrur til Sands mikudagin 18. juni***
Úr Steinatúni kl. 9.15.
Av Gomlurætt kl. 9.45.
Ganga eftir kirkjugøtuni saman við Tilhaldsfólkunum á Sandi úr kirkjuni og framvið Todnesi, prestagarðin. Hetta er í fótasporðum Kálv.
Hetta var leiðin hjá Kálvi úr kirkjuni og heim til hús.
Marius Klementsen sigur frá ymiskum sagnunum um Kálv, so hvørt vit koma til tey søguligu støðini. Túrurin er lættur uml. 1,5 tíma.
Kirkjugøtan gongur paralelt við landsvegin, væl ber til at verða tikin upp í bussin, um ein ikki orkar at ganga allan vegin.
11.45 Við bussi við Kálmannarætt til Húsavíkar.
12.30 Døgurði í bygdahúsinum. Hugleiðingar um Kálv Lítla.
15.00 Drekkamunnur.
Av Gomlurætt kl. 16.30
Kostnaður 400,- Gjaldast týsdagin.
***Týsdagur***
10.00 – 11.30 Vit syngja Knút Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Opið hús
***Mikudagur***
Tilhaldið stongt (Vit eru á Sandi)
***Hósdagur***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grethe Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin - Vit lesa, Slavernes slægter, Alex Frank Hansen. Hittast 28. august
14.00 – 16.00 Boccia Alma Poulsen
***Fríggjadagur***
10.00 - 17.00 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur opið mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit hava summarsteðg.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
***Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00. Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuðr at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 18. juni***
fara vit at ganga í fótasporum Kálv Lítla saman við Tilhaldinum í Havn. Vit hittast við kirkjuna kl. 10.15 og ganga inn til Kálvmannarætt. Marius Klementsen verður ferðaleiðari. Aftaná eta vit døgurða í bygdahúsinum í Húsavík. Neyðugt er at melda seg til túrin á tlf. 211921.
***23. juni***
fara vit ein dagstúr í Kallsoynna. Vit koyra til allar bygdirnar saman við staðkendum ferðleiðara. Á túrinum eta vit krúnhjortakjøt til døgurða. Nærri skrá og tekningarlisti liggja í tilhaldinum og ein kann eisini ringja á tlf. 211921 at frætta nærri. Øll eru hjartaliga vælkomin við.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
er í summarfrí frá 18.06.2008.
Opið verður aftur 02.09.2008.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**70 ár**
Hósdagin 19. juni verður Jógvan Joensen, Norðragøta 70 ár. Dagurin verður hildin í Gøtubrá frá kl 18.30.

**80 ár**
17. juni fyllir Henny Joensen, Fuglafjørður 80 ár. Dagurin verður hildin í Thabor leygardagin 21. juni frá kl. 18.